LØGTINGIÐ

Eirikur í Jákupsstovu, landsstýrismaður
Tilfeingis- og vinnumálaráðið

Fíggjarnevndin

23. januar 2026

LM-066/2025 hm/ód
(at tilskila í svari)

Í sambandi við viðgerð av LM-066/2025: Uppskot til løgtingslóg um fyrireiking, prosjektering og útboð av Suðuroyartunlinum við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum setir Fíggjarnevndin landsstýrismanninum í tilfeingis- og vinnumálum saman við Jarðfeingi hesar spurningar at svara skrivliga.

Spurningarnir skulu verða svaraðir í seinasta lagi mánadagin 2. februar 2026.

Upplýst er fyri nevndini, at jarðfrøðin á *Skarvanesleiðini* er nógv kannað, men at nú mælir Jarðfeingi til, at úti fyri Skarvaneslandinum eiga nakrar kanningar at gerast afturat í samband við faldirnar, sum eru staðfestir.

Spurningar:
1. Hvørjar kanningar verður mælt til at gera?
2. Hvussu langa tíð tekur hetta agera?
3. Hvussu langa tíð tekur tað at viðgera dáturnar, áðrenn úrslitið fyriliggur?

Upplýst er fyri nevndini, at á *Múlaleiðini* eru nógvar kanningar gjørdar, men at enn vanta nakrar.

Spurningar:
4. Hvørjar kanningar eiga at gerast afturat (á sjógvi og á landi)?
5. Hvussu langa tíð tekur hetta at gera?
6. Hvussu langa tíð tekur tað at viðgera dáturnar, áðrenn úrslitið fyriliggur?

Vegna Fíggjarnevndina

Hallur Markná
skrivari